# Starvsskipan fyri nevnd Landsbankans og Búskaparráðið

## Alment

Sambært § 4, stk. 1 í landsbankalógini, tað er løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð, ger nevndin reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Henda starvsskipan fær gildi, tá nevndin hevur samtykt hana.

Henda starvsskipan kann broytast eftir uppskoti frá nevndarlimunum, um meiriluti er fyri broytingaruppskotinum. Broytingarnar fáa gildi fyri nevndina, tá nevndin hevur samtykt tær.

Landsbankin hevur sum endamál at virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Hetta verður útint við, at landsbankin er almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur. Fíggingarvirksemið er gjøllari útgreinað í §§ 6-13 í lógini um landsbankan, og greiningarvirksemið í §§ 14-15 og § 24 í lógini.

Nevndin í landsbankanum er samstundis Búskaparráð, sambært grein 2 í lógini um Búskaparráð. Uppgávan hjá ráðnum er at fylgja við í búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Virksemið er útgreinað í §3 í lógini um Búskaparráð.

## Nevnd

Sambært § 2, stk. 2 er nevndin skipað við 5 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 3 ár.

Vísandi til § 2, stk. 2 í landsbankalógini, velur landsstýrismaðurin formannin.

Eingin av nevndarlimunum kann vera í stjórn ella nevnd fyri fíggingarstovnar og tryggingarfeløg. Nevndin kann loyva stjóranum og leiðandi starvsfólkum at vera nevndarlimir í almennum ella hálvalmennum stovnum. Tað verður at taka avgerð um í hvørjum einstøkum føri.

**Viðtøkuføri:**
Nevndarfundir eru viðtøkuførir, tá 3 av 5 nevndarlimum eru møttir. Øll mál verða avgjørd við vanligum meiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er formansins atkvøða avgerandi.

**Nevndarfundir:**
Formaðurin hevur ábyrgd av, at nevndarfundir verða hildnir, tá tørvur er á tí og í minsta lagi hvønn ársfjórðing. Nevndarfundur skal altíð haldast, um ein av limunum í nevndini setur fram ynski um tað.

Stjórin kallar vegna formannin inn til nevndarfundir. Hetta verður gjørt umvegis teldupost.

Nevndarfundir skulu so vítt gjørligt verða fráboðaðir við 7 daga freist. Alt fundartilfarið skal, so vítt gjørligt, vera sent saman við fundarfráboðanini.

Berst limi frá at møta á fundarstaðnum til regluligar fundirnar, ber til at halda fundin elektronisk, eitt nú umvegis telefonkonferansu ella skype.

Nevndin kann halda serstakar fundir (ad hoc) umvegis Teams, inn í millum ásettu nevndarfundirnar, eftir tørvi, fyri at samskipa arbeiðið ella umrøða einstøk aktuell mál. Innkalling til slíkar fundir er umvegis Teams og teldupost.

Formaðurin leiðir nevndarfundirnar.

**Gerðabók**:
Nevndin skal fyriskipa at gerðabók verður førd yvir øll mál, sum nevndin viðgerð.

Í gerðabókini skal standa:

- dagsskrá fyri fundin, har tilskilað verður, hvat er á skrá hjá landsbankanum og hvat er á skrá hjá búskaparráðnum
- hvør avgerð er tikin fyri hvørt mál
- yvirlit yvir nevndarlimir, sum eru á fundinum[1] og
- dagfesting.

Nevndarformaðurin hevur ábyrgdina av, at gerðabókin verður skrivað og løgd fyri nevndarlimirnar at skriva undir. Við undirskrivingini vátta nevndarlimirnir, at gerðabókin verður góðtikin. Tekur nevndarlimur ikki undir við avgerðunum hjá nevndini, skal hetta, um nevndarlimurin biður um tað, førast í gerðabókina.

Nevndarlimur, sum ikki hevur verið á nevndarfundi, skal seinni vátta í gerðabókini, at hann hevur kunnað seg um tað, sum stendur í gerðabókini.

Gerðabókin skal vera teldutøk, skilt á tann hátt, at fundarfrágreiðingarnar, verða undirskrivaðar og ljóslisnar inn í kervið hjá Landsbankanum. Avgerðargrundarlagið verður eisini ljóslisið inn í kervið.

**Seta stjóra og leiðandi starvsfólk**:
Nevndin setur stjóran í starv og loysir hann úr starvi. Nevndin góðkennir tilnevning og uppsøgn av leiðandi starvsfólki í landsbankanum. Nevndin góðkennir setanartreytir fyri leiðandi starvsfólk í landsbankanum.

## Stjóri

Stjórin hevur um hendi umsitingina og dagliga raksturin av landsbankanum, sambært ásetingunum um virki landsbankans í lógini um Landsbankan og teimum ásetingum, nevndin ger. Íroknað arbeiðið at vera skrivstova hjá váðaráðnum og búskaparráðnum.

Stjórin ger tilmæli til nevndina og fyrireikar tey mál, ið nevndin tekur til umrøðu ella avgerðar.

Mál, sum krevja skjóta avgerð, verða boð send út umvegis elektroniskar miðlar til allar nevndarlimir. Tekur meirilutin undir við tilmæli stjórans, arbeiðir formaðurin saman við umsitingini víðari við málinum.

Í seinasta lagi 31. mars leggur stjórin fram fyri nevndini roknskapin (sum tó ikki er grannskoðaður), og frágreiðing um virki landsbankans í undanfarna ári.

Stjórin tilnevnir starvsfólk landsbankans og loysir tey úr starvi. Setan av leiðandi starvsfólki skal nevndin góðkenna.

Stjórin, saman við einum starvsfólki, bindur landsbankan.

Stjórin kann ikki vera í leiðsluni í privatum fyritøkum ella vinnufeløgum, ella reka privatar vinnufyritøkur.

---

[1] Luttekur nevndarlimur umvegis telefon, skype o.l., er viðkomandi møttur á fundi

## Roknskaparlig viðurskifti

Roknskaparár landsbankans er álmanakkaárið.

Landsgrannskoðanin grannskoðar roknskapin hjá landsbankanum. Bókhaldið verður ført í Búskaparskipan Landsins. Nevndin viðger grannskoðarafrágreiðing og tær viðmerkingar, sum kunnu vera.

Roknskaparinstrukstur skal gerast fyri landsbankan.

Umsitingin ger rapporteringar til nevndina, eftir nágreiniligari ásetingum frá nevndini. Landsbankin skal skipa innaneftirlit við teimum ásetingum, sum nevndin setur og tað virksemi, sum landsbankin fremur.

Nevndin tryggjar, at landsbankin fylgir almennum reglum fyri almennar stovnar.

## Føroya Váðaráð

Landsbanki Føroya er skrivstova hjá váðaráðnum.

## Búskaparráð

Landsbanki Føroyar er skrivstova hjá búskaparráðnum. Umsitingin fyrireikar konjunktur-frágreiðingar og evnisfrágreiðingar, sum búskaparráðið so viðgerð.

Búskaparráðið luttekur í fyrireikingini í tann mun ráðið metur tað neyðugt og ráðið kann eisini sjálvt fyrireika og gera evnisfrágreiðingar um ráðið metur tað neyðugt.

## Hvør úttalar seg vegna landsbankan og búskaparráðið

Nevndarformaðurin og stjóri landsbankans kunnu úttala seg vegna bankan. Nevndarformaðurin, sum samstundis er formaður í búskaparráðnum, úttalar seg vegna búskaparráðið. Miðað verður eftir, at stjórn úttalar seg vegna bankan og nevndarformaðurin úttalar seg vegna búskaparráðið.

## Ógegni

Nevndarlimur/ráðslimur viðger ikki mál, sum kunnu hava serligan áhuga fyri hann. Víst verður eisini til § 3 um ógegni í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

## Tagnarskylda

Limir í váðaráðnum, starvsfólk í landsbankanum, hjálparfólk og onnur, ið gera arbeiðið fyri landsbankan, hava skyldu (undir ábyrgd sbr. § 152 og §§ 152c-152f í revsilógini) at halda trúnaðarupplýsningar loyniligar, sum tey fáa kunnleika til gjøgnum sítt virksemi. Hetta er eisini galdandi eftir at starvstíðin o.a. er lokin. Nevndarlimir koma undir somu tagnarskyldu.

Búskaparráðið og nevnd Landsbankans

Tórshavn, tann 27/9 - 2021